# Ræðuligt

**Seinastu 70 minutt-irnar mátti ein skaddur Jákup á Borg fylgja dystinum móti HB av síðulinjuni**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*

Jákup á Borg lat læru vera læru, tá hann fór á vøllin sunnudagin. Undan dystinum var greitt, at tað fór at verða trupult at fáa frí frá skúlagongdini, men álopsmaðurin legði vertin á skúlan, og kom so upp kortini.

Talan gjørdist tó ikki um nakran drúgvan dyst fyri hanara viðkomandi, tí eftir bert 20 minuttum noyddist Jákup skaddur av vøllinum, og hetta var sjálvandi nakað, sum hann var vónbrotin um eftir dystin.

- Hatta var nakað lort. Møguleiki er fyri, at eg noyðist at taka skúlan umaftur, tí eg kom upp, og longu eftir trimum minuttum varð eg so skaddur.



*Jákup á Borg sigur, at hann longu nú kann lova, at hann ongan tíð fer at verða venjari*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Ræðuligt

Spurdur, hvussu tað so kendist, at sita uttan fyri seinastu 70 minuttirnar, segði Jákup, at tað var ræðuligt.

- Eg kann so longu nú lova, at eg ongan tíð í lívinum fari at verða venjari. Slíkan spenning klári eg ikki at uppliva fleiri ferðir.

Saman við hinum á liðnum skuldi Jákup so sjálvsagt brúka sunnukvøldið til at hátíðarhalda gullið. Spurdur, um hann so skuldi niður aftur til Danmarkar mánamorgunin, segði hann, at tað visti hann ikki.

- Nú má fyrst fara at kanna, um tað yvirhøvur loysir seg at fara niður. Um eg kortini skal taka skúlan umaftur, so tími eg ikki avstað.

# Ion fer ongan veg

**Í HB ásanna teir, at tað verður neyðugt at fáa nýggjar spælarar at hjálpa til, og tað skulu vera sovornir, sum kunnu teljast ímillum teir berandi**

VENJARI
*Jóannes Hansen*

Fríggjadagin var at lesa í blaðnum, at HB venjarin, Ion Geolgau, er ovast á ynskilistanum hjá klaksvíkingum. Og lokalblaðið í Klaksvík, Norðlýsið, hevði sama dagin somu tíðindini.

Men stjórin í Havnar Fótbólti, Steinfinn Mittelstein, slær fast, at tað kemur ikki upp á tal, at HB venjarin fer nakran veg:

– At tað er stórur áhugi fyri felagnum hjá okkum, fekk eg enn eina ferð staðfest hóskvøldið og fríggjadagin, tá tað fréttist, at klaksvíkingar høvdu áhuga at fáa Ion norður. Telefonin kimaði aftur og aftur, og HB viðhaldsfólk vildu vita, hvussu tað nú var vorðið.

Og hvat segði tú teimum?

– Eg segði teimum, at tá vit eftir GÍ dystin settu Ion Geolgau aftur í venjarasessin – eftir at spælararnir høvdu heitt á okkum og Ion var gingin við til at taka við aftur – so var tað undir somu treytum, sum vóru galdandi frammanundan. Fyrr í ár longdu vit sáttmálaskeiðið til og við 2003, og soleiðis verður tað. Vit, sum hava ábyrgd í felagnum, og venjarin hava onga ætlan um at broyta hetta, og so er tað líka mikið, hvat er og verður at frætta frá onkrum, sum verður sagdur at standa leiðsluni nær, sigur ein avgjørdur stjóri í Havnar Fótbólti.

Úr Klaksvík frætta vit, at tað í síðstu viku vóru samráðingar millum KÍ og Ion Geolgau. Tað var orsøkin til, at KÍ nevndin greiddi peningastuðlunum frá, hvussu landið lá.

## Leita eftir styrki

Tað hevur verið skrivað og tosað nógv um vánaliga kappingarárið hjá HB, og bæði alment og privat hevur so at siga við luppi verið leitað eftir orsøkum. Tí skulu vit ikki gera burturúr hesum, men í HB eru teir farnir undir fyrireikingarnar til komandi kappingarár:

– Vit rokna við, at so at siga allir, sum hava verið við í ár, aftur fara at spæla komandi ár. Vit vóna, at teir, sum hava verið skaddir, fara at koma fyri seg aftur, og so ætla vit at styrkja um hópin. Gongdin hevur víst, at tað er neyðugt við berandi kreftum at hjálpa ungu og evnaríku monnunum, sum heilt víst eru mentir, sjálvt um úrtøkan ikki hevur verið so góð í ár.

Leita tit eftir spælarum í Føroyum ella uttanfyri landoddarnar?

– Tað dugi eg ikki at siga. Saman við Ion hava vit roynt at hava útlendingar eina ferð. Tað eydnaðist ikki væl, m. a. tí útlendingarnir vóru skaddir. Men tað er torført at fáa fatur á føroyskum spælarum, sum kunnu lyfta spælið nógv upp, so um tað eydnast at finna fram til góðar útlendingar, sum avgjørt verða mettir at fara at styrkja um liðið hjá okkum, so taka vit fegnir av, eru orðini hjá Steinfinni Mittelstein.

Og so vita klaksvíkingar, at teir tvey tey næstu árini kunnu gloyma alt um Ion Geolgau. Um tað verður Kurt Mørkøre, Oddbjørn Joensen, Tomislav Sivic ella onkur annar, sum skal standa fyri venjingini, verður ivaleyst meiri at frætta um – ivaleyst um ikki so langa tíð.

# Ikki sum hini

**Tróndur Vatnhamar hevði eina heilt serliga upphiting til grannauppgerðina móti HB**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*




*- At byrja við vóru fleiri, sum ikki tóku meg so seriøst, men í dag haldi eg, at tað er sligið fast við 12-tumma seymi, at eg eigi plássið í málinum.*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fyri tveimum árum síðani varð hann mest av øllum ein neyðloysn. Síðani hetta hevur Tróndur Vatnhamar tó ment seg, og í dag ivast eingin í, hvør eigur plássið millum stengurnar í B36-málinum. Sunnudagin slapp hann so eisini at rópa seg føroyameistara, og sjálvur helt málverjin, at nú mundi hann hava sannført um sítt virði.

- At byrja við vóru fleiri, sum ikki tóku meg so seriøst, men í dag haldi eg, at tað er sligið fast við 12-tumma seymi, at eg eigi plássið í málinum.

## Upphitingin

Dysturin sunndagin var kanska tann størsti, sum Tróndur hevur verið við til, og tá vit spurdu hann, hvussu hann løddi seg sjálvan til uppgávuna, avdúkar málverjin, at hann kanska ikki er sum øll onnur.

- Eg skal siga akkurát, sum er. Eg var í brúdleypi leygarkvøldið. Klokkan tvey fór eg so til songar, og har legði eg meg at hyggja at pornofilmum, so eg var púrasta klárur til dystin í dag, sigur hann flennandi.

Spurdur, um sunukvøldið so eisini skuldi nýtast til filmar, svarar málverjin flennandi, at tað verður tað ikki.

- Nei. Í kvøld er tað daman, sum stendur á skránni!

# Hoyrir til

**Allan Mørkøre tekur sær ikki nær, at áskoðarar hjá mótstøðuliðnum rópa eftir honum undir dystum**

FÓTBÓLTSTOS
*Jákup Mørk*



*. Eg haldi, at eg eri vorðin ov gamal til at taka mær av slíkum, sigur Allan*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Tað er neyvan at tak ov dýran til, tá sagt verður, at Allan Mørkøre var illa lýddur í B36 húsinum sunnudagin. Áskoðararnir róptu at kalla hvørja ferð, sum landsliðsmaðurin hevði bóltin, men sjálvur heldur hann ikki, at hetta er nakað, sum hann kennir seg raktan av.

- Tað taki eg bara sum eitt kompiment. Eg haldi, at eg eri vorðin ov gamal til at taka mær av slíkum, sigur Allan, sum eisini heldur, at slíkt hoyrir eini grannauppgerð til.

## Høvdu møguleikarnir

Um sjálvan dystin helt Allan Mørkøre annars, HB átti sínar møguleikar, men at teir ikki tóku av hesum.

- Vit skuldu avgjørt dystin í fyrra hálvleiki. Vit vóru tað betra liðið, og vit høvdu okkara møguleikar, men tað gekk so ikki hjá okkum.

- Lat meg annars nýta høvið til at ynskja B36 hjartaliga tillukku við gullinum. Teir hava uppiborið gullið, segði ein vónbrotin Allan Mørkøre eftir dystin sunnudagin.




# Oljuráðstevna í Norðurlandahúsinum

Eftirmeting av 1. útbjóðing og framtíðin

Týsdagin 27. noveber og mikudagin 28. novmber skipar Oljuvinnufelagið við stuðli frá Oljumálastýrinum og FOIB fyri oljuráðstevnu í Norðurlandahúsinum. Fyrsta ráðstevnan av sínum slag var fyri einum ári síðani. Hesaferð er evnið ein eftirmeting av 1. útbjóðing - av úrslitunum av teimum fyrstu boringunum undir Føroyum og hvussu framtíðin sær út. Har verður so bæði sett fokus á vinnuna, oljufeløgini og Oljumálastýrið og føroyskar myndugleikar. Eisini verður nomið við samfelagsligu avleiðingarnar av eini oljuvinnu.





Eins og í fjør fer Sosialurin at geva út eina serstaka útgávu til ráðstevnuna. Har fara vit at viðgera ráðstevnuna og teir spurningar hon fer at umrøða – í samrøðum, greinum, viðmerkingum o.l.

Einstaklingar, fyritøkur, stovnar og feløg, sum tilknýti til eina komandi oljuvinnu, eru vælkomin at brúka hetta góða høvið til at gera vart við seg í serblaðnum. Tað veri seg gjøgnum kunningarskriv, lýsingar o.l.







Fyllið út seðilin og sendið hann til okkara. Sosialurin rindar postgjaldið. Seinasta freist at lata okkum tilfar, kunningarskriv og lýsingar til blaðið er 5. november.

Undirritaði, felag e.l. ynskir at fáa fleiri upplýsingar um serblaðið. Tað veri seg um kunningarskriv, lýsingar e.l.

Avsendari:

Navn á fyritøku ________________
Adressa ________________
Kontaktpers. ________________
Teldupostur ________________
Telefon ________________

Tíðindablaðið
Sosialurin
Box 76 110 Tórshavn